# Reglugerð fyri Betri Stuðul

betri

Vísandi til viðtøkur fyri Ognarfelagi Tryggingar-takaranna (hereftir OT), §3, stk. 2, setur nevndin samsvarandi góðkenning frá aðalfundi hesa reglugerð í gildi.

## § 1 Heiti og heim staður

Stk. 1. Heitið er Betri Stuðul.
Stk. 2. Betri Stuðul er partur av virkseminum hjá OT, og er ikki ein sjálvstøðug løgfrøðilig eind.

## § 2 Endamál

Stk. 1. Endamálið er, at skapa tryggleika umvegis stuðul, undantikið rakstrarstuðul, til virksemi, ið gagnar tryggingartakarum, millum annað virksemi, ið er:

1) Skaðafyribyrgjandi
2) Sjúkufyribyrgjandi
3) Tryggleikaskapandi

Stk. 2. Stuðul kann eisini latast til annað samfelags-gagnligt virksemi, millum annað til list, gransking og mentanarlig átøk.
Stk. 3. Betri Stuðul kann virka sum stigtakari, sam-skipari og/ella stuðul.

## § 3 Stuðulsupphædd

Stk. 1. Stuðulsupphæddin verður ásett árliga av nevndini í OT í sambandi við støðutakan til afturbering.

## § 4 Nevnd

Stk. 1. Nevndin, ið hevur evstu ábyrgd av øllum viðurskiftum viðvíkjandi Betri Stuðul, hevur 4 limir, ið eru valdir á henda hátt:

i. 2 umboð úr nevndini hjá OT,
ii. 2 umboðsráðslimir hjá OT,

Stk. 2. Formaðurin í nevndini í OT er eisini formaður í nevndini í Betri Stuðul.
Stk. 3. Ongin samsýning verður latin fyri nevndar-arbeiðið.
Stk. 4. Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár í senn.

## § 5 Nevndarfundir

Stk. 1. Nevndin hevur fund 2 ferðir um árið, ella eftir tørvi.
Stk. 2. Fundarætlan verður løgd fyri alt árið við ársbyrjan.
Stk. 3. Fundur verður hildin um í minsta lagi tveir nevndarlimir skrivliga hava sett fram ynski um hetta.
Stk. 4. Fundarskráin skal í minsta lagi innihalda fylgjandi fundarevni:

1) Góðkenning av fundarfrágreiðing
2) Fíggjarstøða
3) Innstillaðar umsóknir
4) Onnur mál
5) Ymiskt

Stk. 5. Nevndarformaðurin stjórnar nevndarfundum.
Stk. 6. Fundurin er viðtøkuførur um í minsta lagi 3 av 4 nevndarlimum eru møttir á fundi.
Stk. 7. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins av-gerandi.
Stk. 8. Stjórn og grannskoðan hava rætt til at møta á nevndarfundi, og kunnu taka orðið á fundinum.
Stk. 9. Fundarfrásøgn verður skrivað frá øllum nevndarfundum, ið skal góðkennast og undir-skrivast á fyrst komandi nevndarfundi.
Stk. 10. Fyrra hálvár í hvørjum ári verður ársfrásøgn og ársroknskapur gjørdur fyri virksemið í Betri Stuðli. Ársfrásøgn og ársroknskapur verða løgd fyri nevndina í OT til góðkenningar.

## § 6 Umsiting

Stk. 1. Betri Stuðul er samsvarandi § 1 partur av OT og verður dagliga leiðslan at útinna av leiðsluni í OT.
Stk. 2. Stjórnin móttekur og viðger umsóknir samsvarandi § 2, ger uppskot til tilmæli til nevndina

fyri Betri Stuðul, og sendir fráboðan til umsøkjara um niðurstøðu eftir nevndarviðgerð.
Stk. 3. Stjórn letur nevndini tilmæli um allar innkomnar umsóknir, ið nevndin tekur støðu til. Undantikið eru umsóknir har søkt verður um kr. 300.000 ella minni, sum stjórnin hevur heimild til at viðgera og avgera sjálv.
Stk. 4. Stjórnin  fyriskipar marknaðarføring av Betri Stuðli og virksemi tess.
Stk. 5. Fyrra hálvár í hvørjum ári ger Stjórnin, í samráð við nevndina í Betri Stuðli, ársroknskap fyri virksemið hjá Betri Stuðul.

## § 7 Gildiskoma og avtøka

Stk. 1. Hendan reglugerð hevur gildi tá ið hon er samtykt av aðalfundi í OT.
Stk. 2. Broytingar í reglugerðini kunnu fremjast tá nevndin í OT hevur tikið avgerð um hetta og broytingin er góðkend av aðalfundi í OT.
Stk. 3. Betri Stuðul kann avtakast tá nevndin í OT hevur tikið avgerð um hetta og avtøkan er góðkend av aðalfundi í OT.

Samtykt á aðalfundi Tórshavn, 21. apríl 2016

*Nevndin í P/F Ognarfelag Tryggingartakaranna*